# Frá Eiði til Florida

**Beinleiðis tíðindasending á Rás2 í morgun avdúkaðu James Olsen og Kent Christensen frá 62° Norður, at Helana Juul og Jennleyg Juul Kallsoy av Eiði skulu í Disney Land**




James Olsen, vertur á Rás2, og Kent Christensen frá ferðaskrivstovuni 62° Norður lesa spentir navnið á vinnaranum

Mynd: Jens Kristian Vang

JÓLAKALENDARIN

Ikki færri enn seks vinningar vórðu burturlutaðir í Miðlahúsinum í morgun, tá kunngjørt var hvørji hepnu vinnararnir í Jólakalendarakappingini, sum Sosialurin skipaði fyri, vóru.

Finnur Hansson frá Poul Michelsen avdúkaði, at tað var Jan Nielsen av Skipanesi, sum vann einki minni enn átta kilo av kaffi frá Poul Michelsen. Tað var sami Finnur Hansson, sum boðaði frá, at Jan Willemoes í Havn var tíggju kassar av Faxe Kondi.

Blaðmaðurin hjá Sosialinum Snorri Brend kunngjørdi síðani, at Helena Svabo Ziska í Havn hevði vunnið ein familjupakka við gisting á Sjómansheiminum í Havn, umframt gávukort frá Bowlinghøllini í Havn, Havnar Bio og Hvonn.

Birgir Waag Høgnesen, frá Marknaðardeildini á Sosialinum, dróg síðani ein seðil, har navnið Karin Kirke Petersen stóð á. Hetta merkti, at hon vann ein televarpsmóttakara.

Heini Joensen frá Demich skuldi kunngera næstseinasta vinningin. Hesin endaði í Hoyvík hjá Astrid Gullfoss, og var tað eitt gosbað.

Síðani var túrurin komin til, at Kent Christensen frá ferðaskrivstovuni 62° Norður skuldi kunngera, hvør høvuðsvinnarin í kappingina var. Nøvnini vóru tvey á lepanum: Helena Juul og Jennleyg Juul Kallsoy, lítlu systrarnar av Eiði. Tær kunnu nú síggja fram til eina ferð til Disney Land í Florida, USA.

Meira um Jólakalendaran í blaðnum í morgin.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi, seinnapartin minkar hann vindin niðut í stívt andøvsgul av norði. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan viud. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -13 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -4 |
| Moskva | -16 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -6 |
| Kiev | -9 |
| Bukarest | -6 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 7 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 5 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. vestan fyri Írland fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið við Skotland fer spakulga í landnyrðing og gevur eitt skifti nógvan vind á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/01 kl. 06[00] – 02/01. 06[00]. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 01/01 kl. 06[00] – 02/01. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 2 mm




Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

## VESTFALLSKYRRINDI

3. jan. Mánin longst frá jørðini
8. jan. Tendring
19. jan. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | 06.27 | 18.52 | 05.27 | 17.52 | 05.42 | 18.07 | 08.27 | 20.52 | 09.27 | 21.52 | 04.42 | 17.07 | 03.42 | 16.07 | 06.42 | 19.07 | 07.42 | 20.07 | 06.12 | 18.37 | 07.27 | 19.52 |
| 9 | 07.14 | 19.37 | 06.14 | 18.37 | 06.29 | 18.52 | 09.14 | 21.37 | 10.14 | 22.37 | 05.29 | 17.52 | 04.29 | 16.52 | 07.29 | 19.52 | 08.29 | 20.52 | 06.59 | 19.22 | 08.14 | 20.37 |
| 10 | 07.59 | 20.21 | 06.59 | 19.21 | 07.14 | 19.36 | 09.59 | 22.21 | 10.59 | 23.21 | 06.14 | 18.36 | 05.14 | 17.36 | 08.14 | 20.36 | 09.14 | 21.36 | 07.44 | 20.06 | 08.59 | 21.21 |
| 11 | 08.41 | 21.02 | 07.41 | 20.02 | 07.56 | 20.17 | 10.41 | 23.02 | 11.41 | - | 06.56 | 19.17 | 05.56 | 18.17 | 08.56 | 21.17 | 09.56 | 22.17 | 08.26 | 20.47 | 09.41 | 22.02 |
| 12 | 09.22 | 21.43 | 08.22 | 20.43 | 08.37 | 20.58 | 11.22 | 23.43 | 00.02 | 12.22 | 07.37 | 19.58 | 06.37 | 18.58 | 09.37 | 21.58 | 10.37 | 22.58 | 09.07 | 21.28 | 10.22 | 22.43 |